## Borðspæl kært til løgregluna

Borgarstjórin í Vollsmose kommune er so ónøgdur við borðspælið "Voldsmosespillet", at hann hevur kært tað til løgregluna. Hann heldur tað vera ósømiligt, at børn skulu spæla hetta spælið, sum alt inniber ein ein býtúr við herverki og øðrum ósømiligum. Kunnaði fólk vilja vera við, at hann ikki fær viðhaldi í ákæru síni. Tó heldur hann, at spælið er vert at sleppa fyri rættin.



## Bussførarar hava lyndi at sovna

20 danskir bussførarar hava verið við í einari kanning, sum danska blaðið 24timer hevur latið gjørt. Meir enn ein triðingur av bussførarunum hava roynt at sovna, - nakrir enntá upp til fleiri ferðir. Kanningarnir vístu eisini orsøkina, og hon tykist at vera grundað av tí ofta seinu ferðsluni, og av at førararnir hava alt ov drúgva arbeiðsskrá.

# Roykfrítt Skarv riggaði væl

**Leygarkvøldið var føroyska vertshúsið og spælistaðið í Keypmannahavn roykfrítt á fyrsta sinni í 33 ár. Roykiforboðið, ið var roynt í sambandi við konsert við Hanusi G. Johansen, riggaði sera væl**

HEILSA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í august verður alment roykiforboð sett í gildi í Danmark á øllum mat- og ølstovum, ið eru yvir 40 fermetrar. Seinasta leygarkvøldið varð roykiforboð roynt á fyrsta sinni á Skarv. Hetta var bert nakrar vikur eftir, at sløkkiliðið vitjaði á Skarv, orsakað av at eldávaringarskipanin fór í gongd av sær sjálvum. Men orsøkin til roykfría kvøldið hevði einki við viðkvæmar roykávararar at gera. Roykiforboðið var í sambandi við konsert við Hanus G. Johansen. Tað var vísusangarin sjálvur, ið hevði sett fram ynskið um roykfrítt høli, men fyri føroysku barrina var hetta ein góð roynd, ið gav innlit í komandi støðuna.

Vit fingu orð á tónleikafyriskiparan á Skarvi, Edmund S. Jacobsen og spurdu hvussu kvøldið spældi av?

### Virdu forboðið

– Vit høvdu hongt forboðsskelti upp, og føroyingar virdu forboðið. Hetta er fyrstu ferð í 33 ár, at Skarv noktar gestunum at roykja innandura. So tað var rættiliga spennandi, at vita hvussu tað fór at rigga. Men tað riggaði væl. Nógvir gestir tosaðu um hvussu nógv betur luftin var, og hýrurin gjørdist bara betur, tí tað er jú bert fáir metrar út í túnið at roykja. Hanus koyrdi á einsamallur við sera góðum tónleiki, alt tað sum fólk vildu hoyra og meira afturat. Konsertin vardi væl longur enn avtalað. Men tá tað leið móti morgni og konsertin var liðug, byrjaðu nøkur aftur at pumpa giftpinnarnar. Forboðið hesaferð var bert ásett til konsertina, greiður Edmund frá.

- Vit høvdu fult hús av føroyingum, sum flestu komu fyri at hoyra tónleik, løgini hjá Hanusi og orðini hjá Poul F. Nógvar gentur fyltu dansigólvið á Skarv aftaná Justin Tiberlake konsertina í Parkini sama kvøldið. Aftanfyri genturnar stóðu smædnu dreingirnir í andakt og lurtaðu eftir tónleikinum, alt gekk eftir bókini.

### Avgerð ikki tikin um framtíðina

Roykiforboðið kemur í gildi um ein góðan mánað. Resturatørar kunnu, tá avskermað ávíst økið, sum eina roykistovu við útsúgving og konstantum undirtrýsti. Danski tubbaksrisin House of Prince hevur úr at gera í Keypmannahavn hesar dagarnar við at royna at hjálpa resturatørunum við roykistovum. Edmund S. Jacobsen, sigur at avgerðin fellur eftir hvat hóskar staðnum og kundanum. Men hann vónar at Skarv kann loysa trupulleikan á annan hátt.

- Hetta kann gerast við at uppseta eina presending sum eina hálvtekju uttanfyri, har hesir óskildigu narkomanarnir kunna standa saman og pumpa. Hetta kann tó verða ein trupulleiki, tí bygningurin er friðaður, og avmarkað er, hvat kann gerast av uttaru broytingum. Tað, ið skal gerast er tó upp til eigaran av Skarv. Men tað er greitt, at konsertin leygarkvøldið kom sera væl við fyri Skarv.





*Týr var ein av føroysku bólkunum, ið lokkaði yvir 300 føroyingar á Christiania hetta fyrsta leygarkvøldið í juni*
*mynd: Niels Uni Dam*

## Konsert á Christiania nú á netinum

**2. juni var føroyskur dansur og konsert á Christiania, sjónvarpsrásin hjá Christiania, CATV sendi frá tiltakinum, og nú er sendingin eisini komin á alnetið.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Týr, Boys In A Band og íslendski Petur Bén spældu fyri 350 áskoðarum har meginparturin var føroyingar í Operaen á Christiania. Kvøldið var sera væleydnað og nú ber til at uppliva tað aftur, ella enduruppliva tað á heimasíðuni catv.dk. Eisini eru samrøður við hálendskan Týr-fjeppara, fyriskiparan av tiltakinum Edmund S. Jacobsen og skiparan av Orminum Langa. Føroyski dansurin var í Pusherstreet og orsakað av hasjsøluni er ikki loyvt at taka film upp har, so dansurin er ikki við í sendingini. Men til samans liggja tveir tímar og eitt korter av tónleiki og práti frá kvøldinum á heimasíðuni.